# Hans Blåsvær stillar upp sum mótmæli

**Stigtakarin til mótmælið móti Sandoyartunlinum, Hans Blåsvær, stillar upp fyri Sjálvstýrisflokkin til løgtingsvalið**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Hans Blåsvær, sum tók stigið til at savna undirskrivtirnar móti Sandoyartunlinum stillar nú upp til løgtingsvalið. Hann velur at stilla upp fyri Sjálvstýrisflokkin, tí hann er einasti flokkur, sum hevur meldað greitt út og er ímóti Sandoyartunlinum*

Herferðin móti Bjarna Askham Bjarnason er ein av orsøkunum til, at hann hevur valt at fara upp í politikk – og Sjálvstýrisflokkin velur hann, tí hann sum tann einasti var í móti Sandoyartunlinum.

– Eg havi ikki verið virkin í politikki, og eg kom upp á listan hjá Sjálvstýrisflokkinum í Suðurstreymoy eftir at listin var liðugur, sigur Hans Blåsvær.

Hann hevur tikið avgerðina m. a. út frá tí, at fólk skulu hava loyvi at siga sína meining uttan at verða forfylgd, soleiðis sum hann heldur, at Bjarni Askham Bjarnason bleiv, eftir at hann sum tann fyrsti skrivaði undir mótmælið móti Sandoyartunlinum.

– Eftir at hasi tíðindini bórust, steðgaðu undirskriftirnar fullkomiliga upp, sigur Hans Blåsvær.

Tá tað kom fram, at Bjarni Askham Bjarnason sum tann fyrsti eftir Hans Blåsvær skrivaði undir mótmælið mánadagin, høvdu umleið 2200 fólk skrivað undir síðani 5. desember. Higartil hava 2495 fólk skrivað undir, so áhugin fyri at skriva undir er minkaður.

– Eg kann als ikki góðtaka raðfestingarnar, sum nú eru gjørdar, og Sjálvstýrisflokkurin var tann einasti, sum var ímóti Sandoyartunlinum, sigur hann.

Hans Blåsvær sigur, at hann vil, at skil kemur í fíggjarliga, og tað heldur hann, at Sjálvstýrisflokkurin er einasti garantur fyri.

Sjálvstýrisvalevni:

# Rætt at gera Sandoyartunlin

**- Ein góð loysn fyri júst Suðuroynna hevði verið ein tunnil til Sandoynna, soleiðis at túratalið við Suðuroynna kundi verið minst tvífaldað, sigur Rúna Sivertsen, valevni hjá Sjálvstýrisflokkinum**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Hóast tað fleiri ferðir er nevnt, at Sjálvstýrisflokkurin er einasti flokkur, sum er ímóti Sandoyartunlinum, so er veruleikin ein annar.

Rúna Sivertsen, valevni hjá Sjálvstýrisflokkinum heldur, at tað er rætt at gera Sandoyartunnilin og at leggja farleiðina til Suðuroynna umvegis Sandoynna.

- Tað er alneyðugt at útbyggja samferðslukervið á ein skilagóðan hátt. Tí er ikki nóg mikið bert at vera ímóti, men vit mugu eisini hava eina loysn at vísa á, sum fremur framgond á øllum økjum fyri alt landið, sigur hon í politiskari viðmerking.

Hon mælir til eina heildarloysn fyri Sandoynna og Suðuroynna eftir eini tíðarætlan, sum eisini gevur pláss fyri, at vit samstundis kunnu nýta pening upp á onnur samfelagsvirði. Skal Suðuroyggin yvirliva er alneyðugt at sambandið við meginøkið gerst betur, heldur hon.

- Ein góð loysn fyri júst Suðuroynna hevði verið ein tunnil til Sandoynna, soleiðis at túratalið við Suðuroynna kundi verið minst tvífaldað, sigur hon.

Rúna Sivertsen sigur, at hetta er ein loysn, sum vit mugu gera eftir eini tíðarætlan, sum fyrst og fremst er fíggjaliga forsvarlig, men eisini tekur atlit til, at hon má fremjast, áðrenn Suðuroyggin doyr út.

Gamli bókahandil
SERTILBOÐ



**Bábelstornið**
R. Rasmussen
**Fyrsta føroyska Skaldsøgan**
&
**Glámlýsið**
R. Rasmussen

SPARIÐ kr. 191,-

Vanligur prísur fyri báðar ........................ 340,-
SERPRÍSUR prísur fyri báðar .......... 149,-

H.N.Jacobsens BÓKAHANDIL
P.O.Boks 55 - FO-110 Tórshavn - tel 311036 -fax 317873 - hnj@hnj.fo - www.hnj.fo

# Skemt útkomin




BÓKAÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

Skemtbøkurnar við tekningum hjá Óla P í Sosialinum er vorðin til eina rúgvusmikla bókarøð. Í dag kemur út í bókabúðirnar tann nítjanda í røðini, Skemt 07. Í bókini eru umleið 130 tekningar, sum hava staðið á baksíðuni í Sosialinum hetta seinasta árið. Á permuni viðger teknarin seinastu eljustríðini, sum hava verið í samgonguni, har hellan í Tinganesi minnir ikki sørt um Runsuvalsstríð, har blóðið flýtur. Løgmaður fylgir sum vera man útviklinginum úr erva, meðan Tobbi hvessir sær svørðið, og Jenis hevur krossin á lofti. Óli P gjørdi tekningina langt áðrenn samgongan nú um dagarnar mátti leggja kongin.

Við hesi bókini eru nærum 3000 tekningar givnar út í bók. Tann fyrsta bókin var Skemt 89. Bókin, sum kemur út, komandi ár, verður so tann 20. í røðini. Tað verður ein serstøk jubileumsbók. Í tí sambandi verður eisini skipað fyri framsýning við tekningum hjá Óla P í Danmark og møguliga eisini í øðrum Norðanlondum. Og fer Skemt 08 at vera meira umfevnandi við tekningum frá øðrum norðurlenskum teknarum og greinum um teknilistina hjá Óla P og sum heild.

Skemt 07 er sett og umbrotin á Sosialinum og prentað hjá Føroyaprent. Hon kostar 150 kr.